| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 15. desember 2016 |
| Býráðsfundur nr. | 13/2016 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2016 tann 15. desember kl. 17.00 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 08. desember 2016 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Gordon M. Petersen

Gordon M. Petersen møtti sum varalimur fyri Jann N. Toftegaard á lista A, hetta vísandi til fráboðan frá Jann til fyrisitingina tann 13. desember 2016

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, kommunustjóri

**Mál nr. 77/2016.**

**Mál viðvíkjandi 2. viðgerð av eykajáttan til íløgur í Fuglafjarðar havn.**

Í samband við íløgur í Fuglafjarðar havn fyri 2016 hevur teknisk deild tann 23. november 2016 boðað fíggjarnevndini frá skrivliga, at av samlaðu íløgunum í Fuglafjarðar havn við eykajáttanum upp á kr. 21,7 mió. verða bert nýttar kr. 20,05 mió í 2016.

Hesiu viðurskifti føra við sær, at kr. 1,65 mió kunnu verða fluttar til komandi ár, og tessvegna um neyðugt verða við til at fíggja partvísar íløgur í havnina í fíggjarárinum 2017.

Sambært býráðssamtykt frá 25. februar 2016, so hevur býráðið tikið avgerð um í sambandi við 2. viðgerð av eykajáttanum av íløgum í Fuglafjarðar havn, at kommunan tekur upp samráðingar við P/F J & K Petersen beinanvegin um at útseta gjaldið fyri endaveggin á frystibryggjuni til 2017.

Talan varð um eina upphædd upp á kr. 2,2 mió. Avtala varð gjørd við felagið um hesi viðurskifti, so sambært hesi skal upphæddin verða rindað felagnum í januar/februar 2017, og sotatt krevur eina fíggjarliga avseting komandi fíggjarár undir íløgum í havnina.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 23. november 2016, og mælir nevndin býráðnum hinvegin til at veita eina eykajáttan upp á kr. 550.000,00 til at rinda part av írestandi í rokning frá P/F J. & K. Petersen, upp á kr. 2,2 mió, soleiðis at henda verða endaliga avgreidd í 2016 ístaðin fyri 2017.

Sostatt verður rokningin fíggjað í 2016 við kr. 1,65 mió, sum eru innan fyri verandi avseting upp á kr. 21,7 mió + kr. 550.000,00 í eykajáttan fyri 2016.

Talan verður um eina eykajáttan til rakstrarstað 751 "Íløgur í Fuglafjarðar havn" konto 3142-00, sum hækkað verður við nevndu kr. 550.000,00 upp á kr. 22.050.000,00.

Fíggingin av eykajáttanini verður fingin til vega frá § 25 "Gjaldføri" "Meirinntøku av partafelagsskatti" rakstrarstaði 832 konto 6180-00.

Ein eykajáttan sum henda førir eina útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkkan á roknskap kommununar fyri 2016.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum, og við hvørja eykajáttan skal verðá víst á, hvussu hon skal verða fíggjað.

Málið hevur verið til 1. Viðgerð á býráðsfundi 29. november 2016 og varð avgerð tikin um at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. Og endaliga viðgerð/avgerð á býráðsfundinum 15.desember 2016.

**Avgerð:**
Samtykt varð við 2. viðgerð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini um at veita eina eykajáttan til íløgur í Fuglafjarðar havn á kr. 550.000,00 konto 3142-00 rakstrarstað 751, og sum fíggjað verður frá § 25 "Gjaldføri" meirinntøku av partafelagsskatti rakstrarstaði 832 konto 6180-00. (8-1). Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Magnus S Midjord, Sigga Óladóttir Joensen, Eyðun á Lakjuni, Sigurð S. Simonsen, Dánjal Vang, Petur Abrahamsen og Gordon M. Petersen. Ímóti atkvøddi Árant Berjastein.

**Mál nr. 78/2016.**

**Mál viðvíkjandi møguligum endurgjaldi til Havsbrún fyri eykakostnað av tunnilsarbeiði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur mótitkið skriv frá Havsbrún um eykakostnað av tunnilsarbeiði í 2015 og 2016 og møguligt endurgjald, hetta vísandi til meirkostnað upp á umleið kr. 5,0 mió.

Somuleiðis verður víst til fundir millum komnmununa og Havsbrún, og sáttmála við Articon, undirskrivaður tann 27. juli 2015.

Vinnunevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 21. november 2016, og heldur, at hetta ikki hevur nakað við grótprís at gera, tá ið hetta mál er endaliga avgreitt sambært sáttmála partanna millum, undirskrivaður tann 27. juli 2015.

Heldur er hetta eitt mál um endurgjald fyri báðar uppsøgdu tunnlarnar 2 og 4, ið P/F Bergfrost hevur yvirtikið.

Nevndin metir, at hetta tessvegna er eitt mál fyri fíggjarnevndina, og samtykti nevndin at beina hetta til viðgerðar í fíggjarnevndini.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 07. desember 2016, og hevur nevndin staðfest, at eingin fundarfrásøgn fyriliggur frá fundinum millum býráðið og Havsbrún tann 18. november 2015, har greitt varð býráðnum frá, at ein eykakostnaður helst kom at liggja um umleið kr. 5,0 mió.

Somuleiðis vísir Havsbrún eisini til fund 24. juli 2015 og fund við vinnunevndina tann 16. november s.á.

Heldur ikki fyriliggur nakað tilfar frá Havsbrún, har meirútreiðslurnar í sambandi við gerð av nýggju tunnlunum fyriliggur, men henda kann helst verða fingin til vega, um nevndin setir Havsbrún fyrispurning um viðurskiftini.

*Málið er býtt upp í 4 partar eftir viðgerðina í nevndini:*

1. Møguligt endurgjald grundað á grótkeyp.
2. Møguligt endurgjald fyri meirkostnað fyri nýggju tunnlarnar.
3. Møguligt endurgjald fyri báðar uppsøgdu tunnlarnar 2 og 4, ið Bergfrost hevur keypt sambært skeyti frá kommununi til felagið, dagfest 17. desember 2015, tinglýst 18. desember 2015.
4. Uppskot frá Sigurði S. Simonsen um lækking av rávørugjaldinum.

Ad. 1. Nevndin er samd um at taka undir við tí partinum av tilmælinum frá vinnunevndini, at hetta mál einki hevur við grótkostnað at gera, tí ein undirskrivað avtala er gjørd partanna millum, dagfest 27. juli 2015, um at kommunan keypir 119.000 m3 av gróti úr tunnlunum fyri kr. 13,1 mió, svarandi til ein m3-prís á kr. 109,00. Hesa avtalu hevur Heilsu- og Innlendismálaráðið fingið innlit í, og hevur góðkent.

Ad. 2. Nevndin mælir somuleiðis býráðnum til, at endurgjald/stuðul ikki verður veittur úr kommunukassanum fyri eykaútreiðslur hjá Havsbrún av nýggju tunnlunum. Í hesum sambandi verður víst til § 50, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við viðmerkingum til lógina, har stendur citat: *"Ein kommuna kann einans taka lut í vinnuligum virksemi, um so er, at virksemi tænir einum almannagagnligum endamáli og ikki hevur vinning fyri eyga".*

Ad. 3. Kommunan hevur havt leigusáttmálar við Havsbrún fyri tunnil 2 og 4, dagfestir ávikavist 18. mai 1994 og 23. mars 1999. Talan er um 30 ára leigumál, sum skuldu ganga út ávikavist tann 18. mai 2024 og 31. desember 2029, hetta sambært ávikavist § 3, stk. 1 og § 1, stk. 2.

Felagsfundur hevur verið á býráðskrivstovuni tann 17. desember 2015 millum býráðsleiðsluna, umboð fyri Havsbrún (Odd Eliasen stjóri), P/F Bergfrost (Símun Paula Sivertsen, stjóra, Elisabeth D. Eldevig, nevndarforkvinnu og Eyðbjørn Larsen, løgfrøðing, har endaligt skeyti millum kommununa og P/F Bergfrost varð undirskrivað eins og átekning og ískoyti á leigusáttmálarnar, og á hesum fundi framgekk einki um endurgjøld, hvørki frá Havsbrún mótvegis kommununi ella frá Havsbrún mótvegis Bergfrost.

Tó varð nógv umrøðu av, nær Havsbrún skuldi fara úr tunnlunum 2 og 4, og varð semja um, at hetta skuldi verða í seinasta lagi 31. desember 2016, ístaðin fyri sum uppskot var um tann 01. juli 2016.

Sigurð S. Simonsen metti, at kommunan møguliga kundi veita Havsbrún eitt endurgjald fyri mista nýtslu av tunnlunum, við tað at felagið fór úr hesum nógv ár, áðrenn leigusáttmálarnir fóru úr gildi. Hann mælir til, at løgfrøðisligu viðurskiftini verða kannað, um hetta er í samsvari við galdandi lóggávu ella ikki.

Ad. 4. Uppskot frá Sigurð S. Simonsen: citat: *Undirritaði skjýtur upp fyri fíggjarnevndini at heitt verður á kommunustýrið um at fremja eina lækking upp á 10% av ráfiskagjaldinum.*

*Omanfyri nevnda dagføring er grundað á, at okkara takstur liggur væl hægri enn hjá okkara kappingarneytum í Føroyum" citat enda.*

Takstir okkara ídag eru sambært gjaldskipanini fyri Fuglafjarðar havn 2013-2017 kr. 0,75% av landingarviráinum. Nýggj gjaldskrá skal verða gjørd í seinasta lagi í apríl 2017.

Ein meiriluti í nevndini Sonni á Horni og Magnus S. Midjord taka ikki undir við uppskotinum, men halda rættast verða, at uppskotið verður tikið við í arbeiðinum, tá ið nýggj gjaldskrá skal verða gjørd fyrst í komandi ári við gildiskomu 01. mai 2017.

**Avgerð:**
Yvirlit yvir eykakostnað hjá Havsbrún av tunnlunum er komið við telduposti, dagfestum 12. desember 2016 kl. 12.45, og verður hesin uppgjørdur til kr. 4.994.162,00.

Atkvøtt varð fyrst um broytingaruppskotið frá Sigurði S. Simonsen sambært ad 4. Uppskotið varð samtykt. 5 atkv. fyri, 3 atkv. ímóti og 1 atkv. blonk. Fyri atkvøddu Magnus S. Midjord, Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Dánjal Vang og Gordon M. Petersen. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen og Árant Berjastein. Blankt atkvøddi Petur Abrahamsen.

Atkvøtt varð síðan um uppskotið tilmæli frá Sigurði S. Simonsen sambært ad 3, um møguligt endurgjald tl Havsbrún fyri mista nýtslu av tunnlunum, og at løgfrøðisligu viðurskiftini verða kannað, um hetta er í samsvari við galdandi lóggávu. Uppskotið varð samtykt. 5 atkv. fyri og 4 atkv. ímóti. Fyri atkvøddu Magnus S. Midjord, Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Dánjal Vang og Gordon M. Petersen. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Árant Berjastein og Petur Abrahamsen.

Atkvøtt varð um tilmælini frá vinnunevndini og fíggjarnevndini um møguligt endurgjald til Havsbrún av grótkeypi sambært ad 1. Tilmælini vórðu samtykt. (9-0). Her fyriliggur beinleiðis avtala partanna millum um grótkeypið, undirskrivað 27. juli 2015.

At enda varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini um møguligt endurgjald fyri meirkostnað fyri tunnlarnar sambært ad 2., hetta sambært umsóknini frá Havsbrún. Tilmæli varð samtykt. (9-0). Sostatt er staðfest, at býráðið hevur tikið avgerð um ikki at veita endurgjald til Havsbrún fyri meirkostnað av tunnlunum sambært umsóknina, hetta vísandi til § 50 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri um vinnuligt virksemi.

*4 býráðslimir Sonni á Horni, Árant Berjastein, Sigga Óladóttir Joensen og Petur Abrahamsen vildu hava niðanfyri standandi viðmerking førda í gerðabókina:*

Í fylgi kommunustýrsislógini, so kann Fuglafjarðar kommuna ikki gjalda endurgjald fyri meirkostnað fyri nýggju tunnlarnar. Fuglafjarðar býráð hevur einmælt samtykt ikki at ganga á møti ein meirkostnað av nýggju tunnlunum. Ein meiriluti í Fuglafjarðar býráð hevur samtykt (5-3-1) at lækka vørugjaldið á havnarlagnum við 10%-um úr 0,75% til 0,675%, tí so kann henda lækking ganga inn í eitt endurgjald fyri ein meirkostnað fyri nýggju tunnlarnar.

**Mál nr. 79/2017.**

***Umsókn frá SP/F Rhesa um stuðul.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá SP/F Rhesa, Niðarivegur 62, 665 Skipanes, dagfest 27.nNovember 2016, har greitt verður frá, at orkuloysnin á Kambsdali, ið er knýtt í orkunetið hjá SEV,

byggir á grøna orku frá vindmyllum, grøna orkugoymslu, har elektrolysa umgerð vatn til hydrogen og oxygen.

Tøknin er tøk, og ein av heimsins størstu framleiðarum av tøkni til burðadygga orkuframleiðslu kemur á vitjan seinast í mánaðinum. Allir politisku flokkarnir hava stuðla hesi verkætlan, men er hetta bert byrjanin. Stóri spurningurin er, um vit sum samfelag eru búgvin til at gera brúk av hesi vitan og taka næsta stigi á leið, men hetta er so upp til vinnuna og politiska skipanina.

Felagið hevur boðað "Setrinum" at yvirtaka alla tøknina á Kambsdali ókeypis, umframt atgongd til alt teirra netverk, soleiðis at "Orkudepilin á Kamsbdali" í framtíðini verður partur av Fróðskaparsetri Føroya.

Støðan á Setrinum er, at dekanur og rektari báðir eru áhugaðir í verkætlanini og duga at síggja ein møguleika fyri at fáa hetta í rætta legu. Teir skulu hava ein fund um hetta ein av komandi døgunum.

Upplýst verður í skrivinum, at Setrið ikki hevur nakra játtan, ið kann verða nýtt til árligt viðlíkahald/servisering av tøknini, og kann hetta gerast ein forðing fyri ætlanini.

Tí loyvir Rhesa sær at søkja Fuglafjarðar kommunu um eina árliga játtan á kr. 65.000,00 fyri árini 2017, 2018, 2019 og 2020 til hetta arbeiðið, hetta vegna tess at kommunan eigur stóran part av æruni fyri, at verkætlanin er komin á mál, frá byrjan kann verða ein partur av nýggju verkætlanini við nýggja eigaranum Fróðskaparsetur Føroya.

Umsøkjarin veit ikki, hvussu kommunan hanfer hesa umsókn sum hesa, men tað at Fróðskaparsetur Føroya kemur inn á Kambsdal, kann bert verða gott fyri kommununa, møguliga Mentanarhúsið kann verða partur av verkætlanini til fyrilestrar og onnur tiltøk.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevdini tann 07. desember 2016, og mælir nevndin einmælt býráðnum til at veita eina prinsipiella játtan upp á kr. 65.000,00 árliga fyri 2017, 2018, 2019 og 2020, sum rindað verður Sentrinum beinleiðis fyri nevndu ár, treytað av , at stuðulin verður nýttur til viðlíkahald/servisering av tøknini, og at játtanin bert verður nýtt til hetta endamál.

Somuleiðis er stuðulin treytaður av, at virksemi hjá orkudeplinum heldur fram á Kambsdali, somuleiðis sum heitt verður á Setrið um framhaldandi at menna verkætlanina.

Prinsipiella játtanin er tó til seinast treytað av, at Heilsu- og Innlendismálaráðið/Fíggjarmálaráðið góðkennir veitingar kommununar til Setrið yvir fleiri fíggjarár, hetta vísandi til § 52 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

**Avgerð:**
Tilmæli frá fíggjarnevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 80/2017.**

**Viðvíkjandi viðurskiftum um ognina hjá Kaju og Jann Toftegaard við Innandalsveg.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið svarskriv frá Kaju Toftegaard, dagfest 11. oktober 2016 til skriv frá teknisku nevndini, dagfest 22. september 2016 í sambandi við at kommunan hevur gjørt stuðlagarð niðan móti Innandalsvegi oman fyri sethús teirra.

Í skrivinum frá Kaju Toftegaard verður mælt til, at kommunan loysir trupulleikan viðvíkjandi typtum dreni í parkeringsplássinum vestan fyri sethús teirra soleiðis, at parkeringsplássið verður asfalterað.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 29. november 2016 og fullu uppskotini og broytingaruppskotini, og sostatt fekst eingin loysn á hesum máli yvirhøvur.

Tekniska nevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum á fundi 05. desember 2016, og mælir nevndin býráðnum til at fáa ein óheftan metingarmann at kanna økið fyri at vita, um økið er typt, og um tað er kommunan, ið møguliga hevur volt trupulleikan.

Somuleiðis verður heitt á býráðið um av seta samtyktina um hesi viðurskifti, sum gjørd varð á býráðsfuyndinum 29. november 2016, úr gildi.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. 7-1. Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Magnus S. Midjord, Sigga Óladóttir Joensen, Eyðun á Lakjuni, Dánjal Vang, Sigurð S. Simonsen og Gordon M. Petersen. Ímóti atkvøddi Árant Berjastein. Blankt atkvøddi Petur Abrahamsen.

Sostatt verður tann parturin av avgerð býráðsins frá 29. november 2016 um óvilduga kanning ógildað við nýggju samtyktini.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.45.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Gordon M. Petersen

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen